í dag! Ì dag vildi saltað hýsa ikki verið søluvøra.

Í 1939 fara skipini at taka hýsu at sigla niður til Aberdeen at selja. Tá hækkaði prísurin so spakuliga. Eg minnist, at í 1941 kemur William Martin inn á Vestmanna, og teir vildu keypa hýsuna fyri 60 oyru kg. Tað var ein veldigur prísur. Tá fór maður av húsi at fiska hýsu!

## Tímalønin 20 oyru

Eg gekk í privatskúla. Barnaheimið, sum tá var í Vestmanna, fekk sær skúla í missiónshúsinum. Har komu so fleiri onnur at ganga. Ingebeth Højgaard var lærari hjá okkum. Tann dagin eg fylti 14 ár, tók eg í hondina á Ingebeth og takkaði henni fyri tíðina og fór úr skúlanum.

So fór eg til Jákup hjá Póli, hann var pápi Poul Hansen, sum gjørdist kendur heilsølumaður og reiðari í Havn. Hann hevði handil, har hann eisini keypti og turkaði fisk, eisini útróðrarfisk. Hann átti í onkrum skipi.

Jákup var blíður og tíður og spurdi: "Nú gamli, hvat sigur tú?" "Jú, eg ætlaði at spyrja, um eg ikki kundi sleppa at arbeiða fisk hjá tygum." Tað var leyst og liðugt beinanvegin. Og lønin segði hann vera 15 oyru um tíman, og teir, sum eru raskir, fáa 20 oyru um tíman.

Hetta var ikki so galið. Tá ið eg gekk niðan aftur, segði eg við meg sjálvan, at nú skuldi eg royna at vera so raskur, at eg kom at fáa 20 oyru um tíman.

Jákup var góður arbeiðsgevari. Vit fingu avroknað eina ferð um vikuna, hetta var ikki vanligt tá. Eg fái so avrokning eftir fyrstu vikuna. Tað vísti seg, at eg hevði fingið 20 oyru um tíman. Tá var eg erpin!

Eg var so í fiski hjá Jákupi, til eg fylti 17 ár. Hetta var strævið, tað var jú eisini so nógv at gera heima.

## Slapp við trolara

So eg helt, at tað kundi verið stuttligt at farið til skips við onkrum. At arbeiða fyri 20 oyru um tíman gjørdist ov lítið í longdini.

At fara við slupp segði mær ikki so nógv, inntøkan var eisini so lítil. Men tá vóru trolararnir byrjaðir at koma. Nakrir vóru komnir fyrst í 30-unum, men teir flestu komu í seinnu helvt av 30-árunum.

Eg visti, at inntøkan við trolarum var so nógv meira. Har mundi inntøkan liggja um einar 500 kr. fyri eina last av saltfiski, sum tað vanliga tók tveir mánaðir at fáa. Hetta var hildið at vera gott, tí tað var nærum eins nógv, sum teir fingu við sluppunum fyri árið. Dreymurin var at sleppa við einum trolara, men eg tordi so illa at fara at tosa við nakran av hesum monnunum.

Reiðariið Uvak fekk Norðstjørnuna í 1938, og í 1939 fingu teir tann eitt sindur størri trolaran Norðbúgvan. Eg hugsaði bert um at sleppa við einum av hesum trolarum.

Ein dagin í 1939 fari eg oman á kajuna. Tá møti eg sýslumannin Gunnar Dahl Olsen. Hann var ein so rættskaffin og hjartagóður maður. Gunnar spyr meg: "Nú gamli, hvat gert tú?" Nei, eg visti líka, "men eg hevði viljað sloppið til skips. Og hevði eg bara sloppið við einum trolara."

Eg visti, at Gunnar var so væl kendur við teir í Uvak. Oddamenninir vóru Leif Waagstein, Niels Mortensen og Christian Holm Jacobsen.

Gunnar sigur: "Ja gamli, nú fari eg til hús, og eg skal ringja til Uvak beinanvegin at vita, um tað er pláss fyri tær."

Fyrrapartin dagin eftir buldrar úti í gongini. Tá er tað sýslumaðurin. Og boðini vóru góð: "Tú gamli, um tú kann vera í Havn á miðdegi í morgin, so hevur tú kjans við Norðbúgvanum."

Har stóð eg, einki hevði eg sagt við mammu, tað hevði eg ikki torað. Eg svaraði ja, eg skal verða klárur í morgin. Tað er fínt, sigur sýslumaðurin, og so spyr hann mammu, um drongurin hevur nóg mikið av klæðum at hava við sær. Túrurin varir vist einar tveir mánaðir. "Ja," sigur hon, "eg fái skavað so mikið frá hinum dreingjunum, at hann fær klárað seg ein túr." Esmar Fuglø var skipari. Jakku og Gimmi hjá Gustav á Sundi vóru við. Jakku hevur fyrr greitt frá hesi sigling í Miðvikuni.

Eg møtti so upp dagin eftir, og vit fóru so avstað. Norðbúgvin hevði verið ein túr á Suðurlandinum, og tann 12. mai fóru vit eystur eftir í Barentshavið.

## Mánaður um fulla last

Vit vóru í Tromsø, har vit skuldu taka kol, tann 17. mai, tjóðardagin hjá norðmonnum. Esmar sigldi við ongum loðsi líka frá Vestfjørðinum til Tromsø, so hann hevur verið væl kendur á hesum leiðum.

Tað var so sera nógvur fiskur at fáa. Hetta var sum at lossa inn á dekkið. Vit vóru bert ein mánaða um tann fyrsta túrin. Vit fóru til Vágs at landa til J.A. Godtfred, har Mikkjal Godtfred var stjóri. Lastin var full, men fiskurin var



*Manningin á Doru á Eysturlandinum í 1915.* ***Fremsta rað f.v.*** *Jógvan Olsen, Hvalvík, Ólavur Joensen, Sørvágur og Tummas Simonsen í Nesinum Vestmanna.* ***Miðraðið:*** *Djóni Christiansen, Sørvágur, Poul Johannesen á Skarpheyggi, Vestmanna, Óla Jákup Kristoffersen, Vestmanna, skipari, Andreas Davidsen, Sørvágur, Tummas Gudmundsen í Gerðinum, Vestmanna.* ***Aftasta rað:*** *Rasmus Hansen, Sørvágur, Karl Isaksen í Skálum, Vestmanna, Jákup Hansen, Sørvágur, Julius Joensen, Vestmanna og Gunnar í Fjørðinum, Vestmanna. Av hesum monnum fórust Óla Jákup og svágurin Julius við Neptun. Teir hava so siglt saman í eini 20 ár í minsta lagi. Julius fiskaði so sera væl*

ikki umrivin, sum vanligt er við saltfiski. Hetta tók Esmar sær ikki tíð til, so nógvur sum fiskurin var. Tá tók hann heldur ikki so nógv í lastina, men kortini var hetta ein roktúrur.

Vit fara avstað aftur, og tað er líka nógv at fáa. Nú fingu vit tað manøvrera soleiðis, at vit skuldu inn í Petsamo at landa. Í dag er Petsamo ein russiskur býur norður móti Íshavinum, men tá var hann finskur.

Italienarar høvdu sent ein dampara upp hagar. Teir høvdu nakrar trolarar, sum eisini føroyingar vóru við. Teir kallaðust Katuma, Angiuilla, Tonnu og Gismondi.

Í Petsamo sluppu nakrir føroyskir trolarar at landa, millum hesar vit og Vesturvarði. So út aftur triðja túrin. Tað var á sama hátt. Vit fingu skjótt uppí Norðbúgvan fyri triðju ferð. Tá fóru vit heim. Nú hevði eg verið tríggjar túrar í tríggjar mánaðir. Vit vóru aftur á Vestmanna tann 19. august.

Inntøkan fyri hesa tíðina hevur verið um 1.500 krónur, og hetta var heilt óført. Hevði eg arbeitt tímaløn hesa tíðina, hevði tað givið millum 100 og 200 krónur.

Tað vóru fleiri raskir menn við, eisini av Eiði. Hesir vóru Poul Vesturdal, Gjáar Heini og Mourits í Jógvanstovu. Mourits dugdi so væl at syngja.

Nú var mitt í hoyggingartíð, og vit høvdu so nógv at hoyggja. Hoyggj var treytin fyri at hava kúgv. Tað var eisini so óhøgligt,



*Jákup Strømsten keypti motorin av Neptun fyri tvey tons av enskum koli. Her saman við konuni Siggu*

har vit hoyggjaðu, hetta gjørdi tað ikki lættari.

Kúgvin mátti so bjargast. At missa hana fór ikki at loysa seg. So eg ringdi til Uvak og segði, at eg kom ikki við aftur. Eg mátti vera heima nú hoyging og eisini fjallið kom fyri.

## Lív sum sjómaður

Eg havi so verið sjómaður alt lívið. Eg var sjey túrar undir krígnum. Tað var fyrst við Norðbúgvanum í 1941 og so við í 1943 við gamla Skálaberg við gamla Mortan sum skipara.

Mammu dámdi einki, at eg sigldi, serliga eftir at Emanuel varð søkt av týskarum í 1941 og tríggir mans doyðu. Av teimum vóru tveir úr Vestmanna.

Eg var við Løjtnantinum í 1944. Vit vóru lastafar hjá Stella Argus. Tað var so nógvur fiskur, at fyrst varð fiskað uppí Løjtnantin, sum so fór til markna. Síðan fiskaðu teir uppí Stelluna sjálva, sum so fór til Bretlands. Hetta riggaði væl fyrsta túrin. Næsta túrin fingu vit eina rúgva av smáum upsa. Hann var eisini gamal, tá ið vit komu til Fletwood við honum. Vit sluppu als ikki av við hann.

Eg var við einum Aberdeen trolara í 1945. Hetta var ein av hesum reyðu trolarunum, sum ofta komu inn á Vestmanna at fáa sær ein ella tveir mans, tí teimum manglaði fólk. Hetta var eitt kvett. Lønin var 1,5 pund um dagin og pundið var 22,40. Hetta gav 33-34 kr um dagin og var ein góð dagløn tá í tíðini.

Mær dámdi so væl at sigla millum teir menninar. Teir vóru sera fyrikomandi. Stóð eg til róður komu teir altíð við eini sigarett til mín. Teir meintu tað í